Tíðindi uttan úr heimi

Løgin riva á »Kursk«

Russisku kanningarliðini hava funnið teir svørtu kassarnar í kavbátinum.

Men størri áhuga hevur tað vakt, at kanningarliðini eisini hava funnið eina løgna rivu í aðrari síðuni á kavbátinum. Russisku bløðini Isvestija og Rossiskaja Gazeta skrivaðu í gjár, at rivan er løtt at fáa eyga á, og at hon er nakað aftan fyri bakkan.

Russiski herflotin hevur ikki viljað gjørt nakrar viðmerkingar til tíðindini um rivuna, men keldur siga við tey bæði bløðini, at rivan er neyvan komin, tá »Kursk« bar við botnin. Lagt verður afturat, at rivan kann vera úrslitið av einum samanstoyti millum kavbátin og eitt annað far.

Blaðið Isvestija skrivar, at »Kursk« kann hava fingið rivuna av stabilisatorunum á einum fremmandum kavbáti. Blaðið vísir samstundis á, at eitt hol er sagað ígjøgnum skrokkin tætt við rivuna, og tað prógvar, at hesin parturin av kavbátinum varð kannaður, tá kavarar vóru niðri hjá »Kursk« seinasta heyst.

Russiski herflotin hevur fyrr sagt, at tað kunnu vera tríggjar frágreiðingar, hví kavbáturin sakk í Barentshavinum. Samanstoytur við annað far er ein av teimum trimum frágreiðingunum.

(Fartekst)

Stríðshugurin í Bretlandi minkar

Tony Blair, forsætisráðharri skal nú royna at fáa bretar at taka undir við áhaldandi álopum á Afghanistan.

Stríðið í Afghanistan minnir um stríðið í Kosovo á sinni. Eisini tá minkaði undirtøkan, tí einki sást til nakað úrslit hóast álop í vikuvís.

Ein meiningakanning í bretska blaðnum Guardian vísir, at ein meiriluti av bretum vil hava amerikanarar at gevast við bumbuálopunum í Afghanistan. Hetta er sama gongd, sum kanningar í fleiri øðrum londum hava víst.

– Har er einki eftir at bumba. Tað, sum vit nú gera, er at útvega okkum fleiri yvirgangsmenn, sigur fyrrverandi bretski verjumálaráðharrin, Peter Kilfoyle.

Tony Blair, sum hevur staðið undir liðini á George W. Bush, forseta í stríðnum ímóti altjóða yvirgangi, hevur longu gjørt av at royna at venda gongdini og at vekja stríðshugin hjá bretum aftur.

– Tað er umráðandi, at vit ikki gloyma, hví vit gera, sum vit gera, segði Blair í gjár.

Varðveita samanhaldið

Kanningin í Guardian vísir, at 62 prosent halda tað vera rætt at nýta hermegi ímóti yvirganginum. Fyri einum mánað síðani søgdu 74 prosent av teimum spurdu tað sama. Men meirilutin er fyri at steðga bumbingunum. 54 prosent siga, at bumbuálopini eiga at steðga nú.

Í Bretlandi eins og aðrastaðni eru fólk vorðin ávirkað av sjónvarpsmyndum, sum vísa, at amerikanskar bumbur hava rakt eitt sjúkrahús, tvær goymslur hjá Reyða Krossi og fleiri íbúðarhús. Samstundis hava fólk fingið varhugan av, at tílíkt kann gera tað trupult hjá USA og Bretlandi at varðveita samanhaldið ímóti yvirganginum.

Tony Blair hevur líka frá fyrsta degi lagt stóran dent á samanhaldið millum lond úr øllum heiminum, og hann ætlar sær í hvussu er at varðveita samanhaldið millum bretar ímóti yvirgangi og fyri krígnum í Afghanistan.

Men tað kann gerast trupult, tí hansara egnu ráðharrar hava ikki økt undirtøkuna fyri framhaldi bumbuálopum. Geoff Hoon, verjumálaráðharri hevur sagt, at Taliban fer í hvussu er at standa ímóti álopunum til nýggjárs, og Jack Straw, uttanríkisráðharri hevur sagt, at bardagin ímóti bin Laden og Taliban kann fara at standa við í óásetta tíð.

(Fartekst)

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 2. november
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 3. november
• Sjávskapping
• Opið frá kl. 19.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
Countrybólkurin spælir

Klaksvíkar Taxi
TAXI
spørsmál til dans
Nummar Blaðsins, vikublað, kan nú nevnir sínum tall er til at fara heim
BUK

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spælir
Bergmenn
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
Sunnudagin 11/11 kl. 15.00 verður hesvetasevskapping
Nógvir góðir vinningar
1. reest krov
2. 1/2 krov
3. 1/4 krov
4. ein góður troystuvinningur
Øll eru velkomin
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65

Í Býin

fríggjakvøld 2/11 DJ Kristian & Allan
Konufólk ókeypis eftaraldri
dørnin kl. 01.00
alt í barnini 1/2 prís til kl. 1.00
leygarkvøld 3/11 DJ Kristian & Allan
20 ára aldursmark
PLATFORM

Á matarseðlinum

Suppa og breyð	35,-
Sandwich Baguette	
hylling & bacon: curry dressing, salat og tomat	45,-
ost & skinka: miracel whip, tomat og bacon	45,-
ost & kalkun: miracle whip, tomat og bacon	45,-
Lasagna v/oksakjøt	49,-
Pitabreyð v/oksakjøt	49,-
v/tunsalat	49,-

Fríggjakvøldið 2/11 & sunnukvøldið 4/11
spæla
Búi Dam, Rógvi á Rógvu,
Herluf Lützen
&
Hallur Johannesen
Hvørdi kveldur
Café Natur
Tlf. 31 29 25

Mat-seðilin
Hósdagin 1. nov.: Kalkunkarbonadur
Fríggjadagin 2. nov.: Saltkjøt
Leygardagin 3. nov.: Lambasteik
Mánadagin 5. nov.: Royktmedistar
Tysdagin 6. nov.: Fiskafrikadellur
Mikudagin 7. nov.: Kjøtdrylur
***
Seinnaparts-TILBOD frá kl.14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari 14,-
Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

Hafnia Lounge
Mánadag - hósdag
Opið kl. 14.00-01.00
Sarvadag stoðgar kl. 03.00
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 14.00-07.00
Sarvadag stoðgar kl. 00.00
Sunnudag
Opið kl. 17.00-01.00
Sarvadag stoðgar kl. 03.00
TlF 31 32 33 - Fax 31 32 03

NÁTT-BUSSURIN
hjá Henri Christensen
Leygarkvøldið:
• Vatn.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vatn. kl. 00.30
• Vatn.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vatn. kl. 04.30
(Kent verður um Kirkju og Kollafjørð eftir avtalu)
Ommur kvøldi kan ein leyvnast eftir avtalu
Tlf. 42 42 54
Bussarnir:
Tlf. 298254

HESA VIKUNA
Hóskvøldið
DJ Marjon Petersen
Fríggjakvøldið
ladies night
DJ Martin Kjærbo
Undirhald: Party People úr DK
Leygarkvøldið
DJ Martin Kjærbo
Undirhald: Party People úr DK
Fótboltur á stórskíggja
Club 20 Café
Írskur bøttur
v/chips, salat & whiskeysoða
69,-
Discoteque
Club 20
Tingholmsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 38
www.club20.fo

Í BÝIN - hvønn hósdag

Í Býin

Í BÝIN - hvønn hósdag

Ræstkjøta-kvøld
Leygarkvøldið 3. november
Rest kjøt og sósur, kaffibø til dessert eftaraldri
kr. pr. pers. 225,-
Berðlingur á tlf. 31 75 00
Hotel Tórshavn

Jólaborðhald
Nú jólini nærkast, ætla vit aftur í ár fyri okkara stóru-tøkna jólaborðhaldi
TAXI spælir til dans til hvørsfólki og hákarettin "Krebinettin" verður aftur á pallinum
Ring og tala ein jólaborð
Ringin tlf. 31 75 00
Hotel Tórshavn